# NOREG TILREIÐ OLJUÓHAPP HE VIÐ FØROYAR

**TILBÚGVING -Skuldi eitt óhapp hent til havs við Føroyar í sambandi við oljuleiting, og ein áheitan kemur úr Føroyum um hjálp, so eru vit tilreiðar at hjálpa**

Jan Müller




*Johan Dahl, landsstýrismaður og Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi uttanfyri høvuðsstøðina hjá NOFO í Stavanger.*
*Mynd: Jan Müller*

Hetta sigur Sjur W. Knudsen, stjóri fyri tilbúgvingarstovnin NOFO, "Norsk Oljevernforening For Operatørselskap", nú Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, hevur verið á vitjan á stovninum í Stavanger.

NOFO er privata tilbúgvingin hjá oljufeløgunum, sum arbeiða á norska landgrunninum. Stovnurin hevur góð 30 ár á baki og hevur tí drúgvar royndir. Hann er fíggjaður av 25 operatøroljufeløgum, sum arbeiða í norskum øki og hevur til uppgávu at standa tilbúgvin 24 tímar um samdøgrið alt árið fyri at fyribyrgja, at oljulekar ol. dálka umhvørvið til havs og inni við land.

Saman við Johan Dahl var eisini stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen á høvuðsstøðini hjá NOFO í Stavanger, har teir fingu eina gjølliga frágreiðing um virksemi hjá stovninum. Tað var í hesum sambandi, at landsstýrismaðurin bar uppá mál spurningin um møguleikan at fáa hjálp frá norsku tilbúgvingini skuldi eitt óhapp hent í Føroyum. NOFO stjórin segði, at skuldi tað komið ein áheitan frá almennu Føroyum um hjálp í sambandi við eitt álvarsligt óhapp t.d. umborð á einum boripalli, so skuldi einki verið til hindurs fyri, at partur av tí sera nútímans og royndu norsku tilbúgvingini hevði kunnað verið fluttur til føroyskt øki. Her er serstakliga talan um skip við teirri mest framkomnu dálkingarútgerðini, sum finst.

Johan Dahl tók spurningin upp, nú tað verður tosað so nógv um óhappið í Meksikanska flógvanum, og nú krittiskar røddir hava ávarað móti at bora á djúpum vatni við Føroyar. Eisini bar hann hetta uppá mál út frá tí sannroynd, at almenna tilbúgvingin í Føroyum enn ikki er nóg væl útbygd til eitt nú at basa dálking frá oljuvirksemi.

### Fremsta í heiminum

Norska tilbúgvingin, sum man teljast millum ta mest framkomnu og bestu í heiminum, fevnir bæði um almennu vaktar- og bjargingartænastuna, sjóverjuna og so privatu tilbúgvingina hjá oljufeløgunum. Hesar arbeiða væl saman men enn hevur ikki verið brúk fyri NOFO tilbúgvingini fyri at forða dálkandi olju at reka móti landi. Tað er ikki hent øll tey 40 árini Noreg hevur framleitt olju á opnum havi. Kortini brúka oljufeløgini meira enn 200 mill. kr. árliga fyri at varðveita eina fyrsta floks tilbúgving og til nýggja